


www.oljan.fo

**Jan Müller** 03 - 09 - 2012

# Vónin á veg í oljuvinnuna

Ein av teimum kendastu og størstu fyritøkunum í landinum, sum framleiðir vørur til fiskivinnuna, er so smátt farin at fyrireika seg til eina møguliga komandi oljuvinnu eisini. Talan er um Vónina, sum leingi hevur verið ein av mest týðandi veitarunum til føroyska fiskivinnu. Vit vóru við á oljumessum fyri nógvum árum síðani og gjørdu av at taka upp henda táttin aftur, nú líkindi kanska eru til, at vit fara at fáa eina oljuvinnu, sigur stjórin Hjalmar Petersen, sum sjálvur var við til oljumessuna í Stavanger í farnu viku. Men hvat kann Vónin gera í hesi vinnuni spurdu vit stjóran? Nógv av tí, sum vit arbeiða við í gerandisdegnum í dag verður eisini brúkt í oljuvinnuni, sum t.d. ketur og veirar, sjeklar, krókar og taljur, alt nakað, sum fiskiskip brúka, og sum eisini verður brúkt í oljuvinnuni, men har eru dimentiónirnar nógv størri og sterkari. Hjalmar Petersen vísir á, at teir hava longu leverandørarnar, so tað snýr seg um at menna seg á einum øki, sum teir longu arbeiða í. Hann hevur tí brúkt dagarnar á ONS at vitja fyritøkur, sum framleiða tað Vónin ætlar at fara undir í framtíðini. Eg havi vitjað virki, sum framleiða vørur til oljuvinnuna. Hesi sambondini kunnu hava stóran týdning fyri okkum, um oljan fer at fylla meira. Hjalmar Petersen vísir á, at Vónin hevur deildir bæði í Fuglafirði, Norðskála, og Havn, so tað átti ikki at verið nakar langur vegur til eitt nú verandi oljuhavnina í Runavík ella um hon skuldi ligið aðrastaðni. Hyggja vit eftir gongdini í Norra, so eru tað nettupp virki sum Vónin, ið arbeiða í fiskivinnuni, sum eisini fara inn í oljuvinnuna, tá hon gerst veruleiki. Mynd Hjalmar Petersen, stjóri á Vónina heilsar uppá stjóran á ONS, Leif Johan Sevdal. Myndatøka oljan.fo/Jan Müller